# Eldraøkið

MORTAN RASMUSSEN



Ein ”gloymdur” bólkur í okkara samfelag eru tey gomlu – serliga tey, ið treingja til dagliga røkt.

Kagaði av áhuga í álit, sum arbeiðsbólkur settur av Helenu Dam á Neystabø fyri Almanna- og Heilsuráðið í árinum 2000 hevur sett at lýsa og viðgera eldraøkið í síni heild.

Ein vælkvalifiseraður bólkur, má eg siga, og eitt væl úr hondum greitt og drúgvt álit sá eisini dagsins ljós umleið tvey ár seinri.

Tað ber ikki til at umrøða alt álitið, men okkurt hissini kann dragast fram:

Eg var forvitin, tá eg sá 3. stykki: **Rættindi teirra eldru**.

Her verður víst til ST-grundreglur, ið umfata **Sjálvræði, Luttøku, Umsorgan, Sjálvsmenning, Virðileika**

**Bólkurin metti, at fleiri av grundreglunum ikki vóru uppfyltar tá, og verður víst á nakrar orsøkir:**

· Ov fá røktarheimspláss
· Ov fá tilboð um uppvenjing og viðlíkahald av mistum førleika
· Manglandi tænastuveitingar frá Heimarøktini
· Ovbyrjan av teimum avvarandi

Lagt verður afturat, at størsti trupulleikin er, at ov fá røktarheimspláss eru til gomul fólk, ið ikki longur megna eginumsorgan.

**Ónøktaði tørvurin á stovnsplássum hevur við sær:**

· At ein alt ov tung ábyrgd verður løgd á avvarandi
· At avvarandi verða noydd av arbeiðsmarknaðinum
· At ein stórur partur av orkuni hjá heimarøktini fer til at veita tungum brúkarum í sambýlum ella í egnum heimi hjálp
· At eldri fólk, sum hava ligið á sjúkrahúsi, verða liggjandi ofta leingi, meðan bíðað verður eftir stovnsplássi.
· At deildin á Landssjúkrahúsinum nærum bert hevur fastbúgvandi fólk.

Lagt varð afturat, at tað tyktist ógreitt, hvør veruliga hevði ábyrgdina av, at trupulleikarnir á eldraøkinum blivu loystir, men at kommunurnar royndu at veita sínum borgarum eitt minimum av trygd fyri røkt. Nakað er sjálvandi hent síðani 2002, men hvørji rættindi hava so okkara eldru í Føroyum í dag? Eru vit nærri málinum?

Eg meini nei, og at okkara landspolitikarar hava steinsovið á hesum økinum øll hesi sjey árini. Okkara eldru mugu hava **lógarfest** krøv til eitt virðiligt lív, eisini um tey verða so veik, at teimum tørvar dagliga umsorgan.

Vit kunnu als ikki rokna okkum at vera eitt framkomið land, kunnu vit ikki so frægt sum útfylla minstukrøv ST um viðfer av okkara gomlu og veiku.

Mín áheitan til Føroya Løgting skal tí vera:

Haldið uppat at keglast um lás og hurðar, paraduuppskot frá súrum andstøðuflokkum og innanhýsis kegli annars - hetta er okkum borgarum als ikki áhugavert – takið tykkum heldur saman um at loysa trupulleikarnar hjá okkara medmenniskjum – gerið tað nú!

# Tað, sum eg lærdi av tí, sum mundi hent við sambýlinum í Pætursgøtu

TORFINN HENTZE

Fyrst vil eg takka Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu, fyri, at hon loyvdi okkum avvarðandi saman við umboðum frá felagnum Javna at leggja okkara sjónarmið fram viðvíkjandi ætlanini hjá Nærverkinum um at niðurleggja sambýlið í Pætursgøtu og flyta teir tríggjar menninar, sum hava sítt heim har, í annan óhóskandi og verri bústað grundað ætlaðum sparingum.

Landsstýriskvinnan eigur eisini stóra tøkk uppiborna fyri, at hon aftan á at hava hoyrt okkara sjónarmið, tók ta skilagóðu avgerð at broyta ætlanina hjá Nærverkinum og lata menninar verða búgvandi í heimi sínum.

Hvat kann so lærast av hesum?

Í einari sjónvarpslýsing fyri felagið Javna, nærmast reypi eg av, hvussu tryggum og góðum hondum sonur mín var í. Havi nú lært, at hesin tryggleikin er fullkomiliga burtur. Hvussu verður næstu ferð, landsins fíggjarlóg skal snøggast til? Ella uppaftur verri, tá ein møguliga heilt onnur samgonga situr við ræðið, og skal spara? - Er tað tá samanum kemur ikki løgið, at tað skal kunna lata seg gera í árinum 2009 at flyta fólk út úr sínum egna heimi uttan so mikið sum at spyrja tey, hvat tey siga til tað?

Tað hevur mangan kenst sera svárt og eyðmýkjandi at noyðast at »blottleggja« sínar privatu trupulleikar alment, og partvíst sítt privatlív eisini, fyri at royna at grundgeva fyri rímiligum sømdum og umstøðum til brekaða son sín. Trupulleikar og umstøður, sum vanligar familjur loysa í allari stillheit innanhýsis. Helt meg vera slopnan undan slíkum nú. Men havi nú lært, at tað er líkt til, at hetta fer at halda fram, so leingi eg livi.

Leiðarin í Nærverkinum var á Portalinum endurgivin fyri at siga, at ætlanin um at niðurleggja sambýlið í Pætursgøtu var fakliga forsvarlig. Vit, avvarðandi at teimum, sum hava heim sítt í Pætursgøtu, hava afturvíst hesum pástandi og væl og virðiliga grundgivið fyri, at ætlanin tvørturímóti var fakliga sera óforsvarlig. Hvaðani ella frá hvørjum í “systeminum” innan Nærverkið tann fakliga ráðgevingin stavar, veit eg ikki. Tað kann eisini gera tað sama, men til alla lukku eydnaðist hesaferð at prógva, at henda fakliga ráðgeving var sera »inkompetent« og óforsvarlig – bæði fíggjarliga og menniskjaliga.

Hesin tilburður átti tí at lært okkum, og tá serliga politiska vald, at embætisfólk í landsins stjórn í ávísum førum kunnu inna ótrúliga stórt vald gjøgnum ta ráðgeving, sum landsstýrisfólk skulu grunda sínar avgerðir á, og soleiðis vera til óbótaligan skaða.

At enda má eg aftur hesaferð taka undir við Kára P, har hann í vísuni kvøður ».........ein finna tú ert í talvinum, har pengarnir fólkið flyta«.

# Almanna-og heilsurøktarafelagið mótmælir sparingum í Nærverkinum

JÓHANNA KØTLUM
forkvinna í Almanna- og heilsurøktarafelanum



Almanna-og heilsurøktarafelagið tekur undir við Føroya pedagogfelag og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og mótmæla harðliga, at sparingar verða framdar í Nærverkinum, á almanna- og heilsuøkinum og har børn og ung hava sína dagligu gongd.

Vit vita øll at sparingar skulu til, tí stórt hall er á fíggjarlógini ½ milliard.

Um tað verður spart soleiðis, sum tað verður lagt upp til nú, verður tað spart eftir reyv, tí nógv av sparingunum raka fyribyrgjandi arbeiðið, sum kanska gevur smávegis sparingar her og nú kemur at kosta okkum fleirfalt í longdini.

At seta meira pening av til fyribyrgjandi arbeiði, so sum góð dagtilhald, við góðum tilboðum til tey eldru ger einsemi minni, avmarkar tunglyndi og varðveitir rørsluførleikan. Hetta er nakað sum gevur samfelagnum sparingar í longdini og borgarunum eina virðiliga lívsgóðsku..

Um vit settu meira pening inn á økið við børnum og ungum, høvdu vit minkað um sálarligar trupulleikar og fingið betur trivna = betri virkandi vaksin fólk. Tað er sparing um vit hugsa visjón og framtíð.

Sum er verða røktarstarvsfólk innan eldra økið sett niður frá at starvast 8 tímar niður í 7 tímar, og tá sjúka er hjá røktarstarvsfólkið kemur ongin ístaðin fyri.

Innan sama øki er longu spart inn á bein frammanundan, so tað sum er fyribyrgjandi arbeiði og trivnaður, verður spart vekk, “kjarnan í lívinum” og røktarstarvsfólkini skulu renna enn skjótari. Tað viðførir at røktarstarvsfólkini trívast verri, hava fleiri sjúkradagar og tilgongdin til hesi útbúgvingarøkini fellur.

Um leiðslurnar innan økini fáa rímulig kor at arbeiða við, soleiðis at teir hava høvi til at skapa karmarnar góðar fyri brúkarin og røktarstarvsfólkini, er tað eitt fantastiska gott øki at starvast á, tað at vera um menniskja.

Vit hava tríggjar góðar útbúgvingar innan røkt í Føroyum, tað er heilsuhjálpara, heilsurøktari og sjúkrarøktarfrøðingar vónandi verður tilgongdin til hesar frálíku útbúgvingarnar góðar, tí stórur tørvur er á hondum innan røkt í Føroyum.

Við vón um at vera hoyrd!

Vegna Almanna- og heilsurøktarafelagið fari eg at ynskja tykkum góðan arbeiðshug, við at finna sparingar, hugsa tykkum væl um og geri tað sum er best fyri Føroyar fólk.

# Fólkaflokkurin og Samhaldsfasti

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Vænti ikki tað bara var undirritaða, ið mundi sett í hálsin, tá ið eg hoyrdi formannin í tingbólki Fólkafloksins senda eina tóma ballón upp í luftina í kringvarpinum nú um dagarnar. Innihaldið í tómu ballónini var, at nú vil Fólkaflokkurin hækka útgjaldið úr Samhaldsfasta. At ballónin var tóm, kom fram í samrøðuni, tí sami formaður í tingbólki Fólkaflokksins ásannaði eisini, at ongin peningur er tøkur at gjalda út beint nú, og at hetta krevur lógarbroyting.

Øll, ið hava áhuga fyri Samhaldsfasta vita, at lógin sigur, at tað er stýrið, ið avger støddina á útgjaldinum og løgtingið, ið ásetur støddina á inngjaldinum. At ongin fyrireiking, ella ætlan um at broyta hetta er gjørt frá Fólkafloksins síðu er sjón fyri søgn.

Tað, ið gjørdi meg mest skakkan, var at Fólkalfokkurin sum ongantíð hevur verið serliga heitur fyri samhaldsfasta og hevur ynskt hann har piparið grør, nú fer at egna við hægri útgjaldi úr sama grunni. Spurningurin er, hvussu óseriøsur ein kann verða og framhaldandi verða tikin í álvara.

Tað er ein sjálvfylgja, at spurningurin um leiklutin hjá Samhaldsfasta og støddin á útgjaldinum verður ein partur av pensjónsreforminum. Tað er ikki nakað, ið Fólkaflokkurin hevur funnið uppá. Fyri Javnaðarflokkin er tað sjálvsagt, at Samhaldsfasti fær ein størri leiklut at tryggja eina góða pensión til tey, ið ikki hava havt møguleika at spart upp til eftirløn. Okkara aðalmál er at tryggja, at ójavnin millum tey sum hava og tey sum onki hava, verður so lítil sum gjørligt á ellisárum. Tað kann bert ein samhaldsføst skipan, sum samhaldsfasti, tryggja.